# Seta ikki samgonguna í vanda

**– Tað er líka mikið um felagið, sum yvirtekur Farmaleiðir, fær flutningskyldu til til útjaðaran, men útjaðarin skal ikki verða verri fyri enn hann er nú, sigur formaðurin í sambandsflokkin um**

FARMALEIÐIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sambandsflokkurin fer ikki at boykotta samgonguna í sambandi við ætlanina at einskilja Farmaleiðir hjá Strandferðsluni.

Tað sigur Kaj Leo Johannesen, floksformaður.

Sostatt vísir hann tí aftur, sum Johan Dahl, løgtingsmaður segði á samferðslufundi í Vági, mánakvøldið.

Á fundinum segði Johan Dahl, at tað var avgerðandi, at felagið, sum yvirtekur Farmaleiðir, fær flutningsskyldu til útjaðaran, so at vinnan í útjaðaranum ikki verður verri fyri enn hon er nú.

– Tað skal framvegis bera til hjá virkjum í útjaðaranum at at keypa 500 kilo av fiski onkustaðni í landinum og fáa tað til virkið líka lætt sum nú. Annars kemur ætlanin at einskilja Farmaleiðir ikki ígjøgnum samgonguna- ikki við sambandsflokkinum í hvussu so er, segði Johan Dahl.

## Boykotta ikki samgonguna

Men nú dregur formaður floksins, Kaj Leo Johannesen í land aftur.

Í fyrstu atløgu ger hann púra greitt, at tað er bara floksformaðurin, sum hevur heimild at greiða frá støðu sambandsfloksins til tey ymsu málini.

Í ørðum lagi ger hann eisini púra greitt, at sambandsflokkurin fer ikki at boykotta samgonguna í sambandi við Farmaleiðir.

– Vit eru samd um, at Farmaleiðir skal einskiljast og tað er eitt mál, sum landsstýrismaðurinn arbeiðir við. Hann skal nú gera eitt uppskot, sum síðani skal viðgerðast í samgonguni. Tá ið samgongan er endaliga samd um ætlanina, verður eitt uppskot lagt fyri tingið. Tað eru sostatt nógvir møguleikar at ávirka og broyta tað uppskotið, sum landsstýrið leggur fram. Og verður neyðugt við broytingum, so verða tær gjørdar.

## Líka mikið við flutningsskyldu

Av tí sama við Kaj Leo Johannesen heldur ikki gera viðmerkingar til smálutir í ætlanini at einskilja Farmaleiðir.

Hjá Johan Dahl var tað avgerðandi at felagið, sum yvirtekur Farmaleiðir, eisini fær flutningsskyldu til útjaðaran fyri at tryggja at vinnulívið í útjaðaranum ikki verður verri fyri.

Formaður sambandsfloksins hevur onga støðu til um talan skal vera um flutningsskyldu ella ikki. Hann sigur, at sjálvandi skal útjaðarin ikki vera verri fyri enn hann er nú.

–Men um flutningsskylda skal fylgja við einskiljingini, havi eg onga meining um. Tað er ein spurningur, sum landsstýrismaðurin kemur at viðgera og taka støðu til.

Annars heldur Kaj Leo Johannesen, at tað er líka mikið um flutningsskyldan fylgir við ella ikki, tí tað eru so nógvir mátar, at flutningurin kann skipast uppá, so at útjaðarin ikki verður verri fyri, heldur hann.



*Tá ið Farmaleiðir verða einskildar, skal útjaðarin ikki vera verri fyri, men tað er líka mikið um felagið, sum yvirtekur Farmaleiðir, fær flutningsskyldu ella ikki, tí tað eru nógvir mátar at skipa flutningin uppá, sigur Kaj Leo Johannesen*

# Nógv bíligari at flyta bilar og farm ímillum Suðuroy og Havnina

**Nú verður munandi bíligari at flyta bæði bilar og farm við Smyrli. Arbeitt verður eisini við at ger tað bíligari hjá ferðafólki og tað verður enntá tosað um at gera tað næstan ókeypis at ferðast við Smyrli**

SUÐUROYARSIGLING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú verður munandi bíligari at flyta bilar og farm ímillum Suðuroynna og Havnina. Tað verður eitt úrslit tað næstan við fullari vissu kann sigast, at Løgtingið ein av allarfyrstu døgunum fer at játta Strandferðsluni pening til at lækka prísirnar fyri farmaflutning ímillum Suðuroy og Havnina.

– Endamálið við hesum er at javntseta vinnulívið í Suðuroynni við vinnulívið í øðrum pørtum í landinum, søgdu teir báðir samgongutingmenninir, Johan Dahl og Hendrik Old á almenna samferðslufundinum í Vági mánakvøldið.

– Tað skal ikki verða dýrari at keypa fisk í einum parti í landinum at keypa fisk og flyta hann úr Havnini til Suðuroyar enn tað er at flyta hann úr Leirvík til Klaksvíkar, segði Johan Dahl.

## Munandi príslækking

Hendrik Old er sannførdur um, at ætlanin at lækka farmagjaldið ímillum Suðuroynna og Havnina, fer at alstóran týdning fyri vinnulívið.

Hann vísti á, at hereftir fer ein stórur treylari, sum tað kostar 3800 krónur at flyta við Smyrli, at kosta áleið 2800 krónur, so tað er ein fittlig príslækking.

Ein minni bilur, sum er 7-9 metrar langur, sum nú kostar 610 krónur at flyta við Smyrli nú, fer hereftir at kosta 310 krónur.

Ein uppaftur minni minni bilur ímillum 5 og 7 metrar, kostar 430 krónur nú, men hann fer niður á 210 krónur.

Hendrik Old sigur, at hetta fer at fáa stóran týdning fyri vinnuna í Suðuroy, ikki bara í sambandi við flutning til Suðuroyar.

Men tað fer eisini at gera vinnuna í Suðuroy nógv kappingarførari, um ætlanin er at selja vørur norðureftir ella til at átaka sær arbeiði norðanfjørðs sum ger, at flutningstól skulu flytast ímillum.

Hendrik Old sigur, at hetta er tað átakið fyri vinnuna í Suðuroy, sum hevur størsta týdning at fáa framt í hesum sambandi.

## Eisini bíligari ferðaseðlar

Teir báðir samgongutingmenninir søgdu eisini, at næsta stigið verður at arbeiða fyri at gera tað bíligari hjá ferðafólki at ferðast ímillum Suðuroynna og Havnina.

Í hesum sambandi hevur samgongan viðgjørt málið um at gera eina samhaldsfasta prísskipan, eisini á ferðaseðlaøkinum, so at tað fer at kosta áleið tað sama at ferðast ímillum Havnina og Suðuroynna, sum tað fer at ferðast úr Leirvík til Klaksvíkar í dag, ella ímillum Gomlurætt og Skopun.



*Hendrik Old, vinstrumegin, og Johan Dahl eru tveir av suðuroyartingmonnunum í samgongu og teir stungu onkuntíð høvdini saman á samferðslufundinum í Vági mánakvøldið. Teir siga báðir, at nú verður fyrsta stigið tikið at lækka flutningsprísirnar við Smyrli, men at arbeitt verður við enn fleiri lækkingum*

Johan Dahl segði, at samgongan hevur avtalað, ein ein partur av tí, sum kemur meiri inn í landskassan við tað, at vegskatturin av bilum hækkar, skal brúkast til at lækka prísin á ferðaseðlum ímillum Suðuroynna og Havnina.

Annars er ætlanin at finna so skipan við Smyrli sum við undirsjóvartunlinum, har tað bara verður goldið annan vegin. Samstundis er ætlanin at flyta ferðaseðlasøluna upp á land og alt tað fer at gera tað munandi meiri ómakaleyst at ferðast, tí tá slepst undan at stilla seg í bíðirøð umborð tvær ferðir at keypa ferðaseðil.

Hendrik Old upplýsti eisini, at samgongan hevur eisini tosað um møguleikan at gera eina skipan, har tað verður mestsum ókeypis at koyra ígjøgnum undirsjóvartunlar og at sigla við Strandferðsluni. Fyribils metingar vísa, at hetta fer at kosta 80 milliónir, so tað verður ikki beinanvegin, men hann heldur, at tað er eitt gott tekin, at spurningurin er tikin til viðgerðar.